


*Árstalsfelagið í Havn slapp burtur úr toppdystinum við Løkin við øllum trimum stigunum og er tí á odda í landskappingini eftir fyrsta triðingin*

Mynd: Birita Hansen

# B36 SLEPPIR IKKI SESSINUM

**FÓTBÓLTUR** Hóast tað mestsum bara var í fyrra hálvleiki, at toppdysturin við Løkin livdi av álvara, gav hann ábendingar um, at tað verður meira enn torført hjá hinum liðunum at skræða oddasessin úr hondunum á vælskipaða B36-liðnum

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| NSÍ | 2 |
| B36 | 3 |

Við einum góðum tólvtamanni á odda eydnaðist B36 í gjár at fáa alt við sær aftur til Havnar, tá ársins fyrsti veruligi toppdystur var á skránni við Løkin, har NSÍ tók ímóti. Undan dystinum var tað so snøgt, at her var tað besta álopið í Vodafondeildini, ið tók ímóti bestu verjuni, men kortini vendi alt onkursvegna á høvdið, tá avtornaði.

Tað hevur verið sagt um B36, at liðið hevur verið øgiliga væl skipað á



Mynd: Birita Hansen

vøllinum, og einsamalla málið, sum HB fekk ímóti grannunum vikuna frammanundan, var tað fyrsta í opnum spæli, sum kom ímóti B36. Men í Runavík í gjár komu tvey mál ímóti B36 í júst opnum spæli, meðan havnarliðið sjálvt skoraði upp á tríggjar deyðbóltsstøður, ið tað fekk – tvey brotsspørk og eitt fríspark.

Í fyrra hálvleiki var talan um ein góðan og spennandi dyst, har bæði lið høvdu sínar møguleikar, men har NSÍ væl og virðiliga var omaná og spældi sera væl. Serliga í tveimum førum mátti Meinhardt Joensen í B36-málinum veruliga vísa síni bestu kynstur, men hinvegin hevði B36 eisini seinni ein skallara á yvirliggjaran.

B36 vísti samanumtikið sínar vælskipaðu dygdir, ið fara at gera tað meira enn torført hjá øðrum